


www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 11 - 2012

# Krúnborgbrøðurnir - Frá fiskivinnu til frálandavinnu

Tað sær ikki mætari út, enn at norska frálandasøgan av álvara endurtekur seg her í Føroyum har kend og aldargomul fiskivinnureiðarí leggja um til nýggju frálandavinnuna. Hetta hava vit sæð bæði hjá Thor í Hósvík og hjá Skansi Offshore (fyrr. Supply Service) í Leirvík. Eftir at hava virkað burturav í fiskivinnuni hava hesi reiðarí lutvíst lagt um til frálandavinnuna. Nú kemur so enn eitt føroyskt reiðarí, ið hevur verið eitt av undangongufeløgunum í føroyskari fiskivinnu og leggur á sama bógv frálandavinnuna. Tað er P/f Krúnborg, sum í dag hevur skrivað undir samstarvs- og eigaraavtalu við norska reiðaríið Simon Møkster Shipping AS um nýtt frálandaskip á 360 milliónir krónur. Sjóvinnan hevur verið ryggurin í okkara familju, og so fer eisini at vera í framtíðini, sigur ein fegin Petur Jacobsen, stjóri við oljan.fo, nú sáttmáli er gjørdur um bygging av nútímans frálandaskipi. Hann sigur í stuttari viðmerking, hvussu hetta kom í lag, at teir komu í samband við norska reiðaríið gjøgnum Corporate Finance deildina hjá BankNordik, sum má sigast at hava hava bygt brýr millum føroysk og norsk vinnuáhugamál. (Lesið samrøðu við Krúnborgbrøðurnar í komandi viku á oljan.fo) Heimasíðan hjá felagnum skrivar, at stovnað verður nýtt føroyskt frálandafelag, P/f Krúnborg Offshore, sum byggir eitt subsea-skip, eitt sonevnt Multi Purpose Support Vessel, saman við Simon Møkster Shipping AS. Skrokkurin verður bygdur á skipasmiðju í Póllandi, og skipið skal gerast liðugt á norsku Simek-skipasmiðjuni. Tað verður 85 metrar langt og 18 metrar breitt. Skipið verður útgjørt við 70 tons krana, ROV-útgerð og tyrlupalli. Subsea-virksemi er sergrein í frálandavinnuni. Skipið kann hava 90 fólk umborð og við fjarstýrdum undirvatnsførum verður arbeitt við umvælingum og eftirliti undir sjógvi. Talan kann vera um arbeiðir upp á boripallar og aðra útgerð. Skipið kann eisini veita vindmylnuídnaðinum tænastur. Trý frálandagfeløg Krúnborg

fer í fyrstu atløgu at eiga 30 prosent av nýggja felagnum og keypir ætlandi 20 prosent aftrat, tá skipið verður latið í mai 2014. - Vit síggja góðar møguleikar í hesi vinnuni. Nú eru trý frálandafeløg í Føroyum, sum veita tænastur á trimum ymiskum økjum. Hesir fjølbroyttu førleikar verða við til at menna føroysku frálandavinnuna uppaftur meira, siga Sámal, Petur og Eiler Jacobsen á Krúnborg. Teir vísa á, at Krúnborg við sínum 48 árum á baki í fiskivinnuni og Møkster við 44 ára royndum í sjóvinnuni, herav 31 ár í oljuvinnuni, skuldi verið rætta samansetingin at sett eitt nýtt frálandafelag á stovn. - Vit hava ongantíð ivast í at fara inn í sjóvinnuna aftur. Spurningurin hevur bara verið, nær og hvar vit skuldu fara til verka. Við hesi ætlan halda vit, at vit hava eitt gott grundarlag at byggja felagið víðari á, siga teir. Víðka virksemi Simon Møkster Shipping AS varð stovnað í 1968 og hoyrir heima í Stavanger. Felagið eigur og rekur 23 skip í frálandavinnuni. Fíggjarstjórin í Simon Møkster Shipping AS, Alf Møkster, er fegin um nýggja samstarvið - Vit fegnast um at kunna víðka okkara virksemi í Føroyum. Frammanundan hava vit 130 føroyingar við okkara skipum, og vit gleða okkum til at samstarva við Krúnborg, sum er eitt dugnaligt reiðarí við drúgvum royndum í føroyskari sjóvinnu, sigur Alf Møkster.  Corporate Finance deildin hjá BankNordik hevur staðið fyri samráðingunum millum partarnar. Arnason & Mortensen hevur virkað sum ráðgevi hjá Krúnborg skrivar heimasíðan www.krunborg.fo.